# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gylti ringurin endaður

**Bárður Bendix Mikkelsen fekk í gjár sítt perfekta punktum sum elituspælari í flogbólti. Í Danmark var Marienlyst fyrsta felag hansara, og við sama felag vann hann í gjár sítt triðja gullmerki hetta kappingarárið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bárður Bendix Mikkelsen hevur alla orsøk at vera nøgdur. Triðja gullmerkið hetta kappingarárið kom til høldar, tá hann og Marienlyst í gjár vunnu DM-gull við 3-1 sigri á Aalborg HIK í seinna finaludystinum*

- Tað er rætt, at eg ivaðist, um eg yvir høvur skuldi spæla flogbólt á hægsta støði hetta kappingarárið. Eg veit, hvat krevst, um tú skalt vera við í hesum, men tá eg fekk møguleikan við Marienlyst, var valið rættiliga lætt.

- Hetta er gamla felagið hjá mær í Odense, og eg var við, tá liðið á sinni flutti upp í elitudeildina. Og við fólkinum, sum teir nú hava, visti eg, at her var ein møguleiki at fáa ein fantastiskan enda sum flogbóltsspælari.

Soleiðis sigur Bárður Bendix Mikkelsen, eftir at hann í gjár var partur av mansliðnum hjá Marienlyst, sum við 3-1 sigri á Aalborg HIK tryggjaði sær danska meistaraheitið í flogbólti.

Hetta var triðja gullmerkið hjá Marienlyst hetta kappingarárið, eftir at liðið undan hesum hevði vunnið norðurlendskt gull og donsku steypakappingina.

### Góð samanseting

Sjálvur hevur Bárður tó ikki spælt so nógv í ár, sum hann hevur gjørt hini árini.

Beinleiðis kappingarneytin til plássið sum hevari verður mettur sum besti hevarin í donskum flogbólti. Men hóast hetta setti nýggj krøv til Bárð, so er hetta ein leiklutur, sum hann hevur trivist væl í.

- Mín leiklutur hevur verið at vera partur av royndasta partinum í hópinum. Har eru nógvir ungir spælarar, og okkara uppgáva hevur líka sum verið at halda gongd í teimum ungu gjøgnum alt kappingarárið.

- Tað hevur sjálvandi ikki alla tíðina verið líka lætt, tí mest av øllum vilt tú jú spæla á vøllinum. Men tað hevur kortini verið stuttligt og ikki minst læruríkt, sigur Bárður Bendix Mikkelsen.

### Óvist við Oyggjaleikum

Sum trífaldur gullvinnari í donskum og norðurlendskum høpi kundi Bárður neyvan ynskt sær eitt flottari punktum, sum flogbóltsspælari. Enn er óvist, hvat framtíðin hevur at bjóða í so máta, men sjálvur roknar hann við, at talan verður um flogbólt á eitt sindur lægri støði, tí sum hann sigur, so er tað trupult bara púrasta at gevast við hesum.

Eitt gullmerki stendur tó eftir sum nakað, ið Bárður ikki hevur vunnið. Hóast heiðursmerkini á Oyggjaleikunum hava verið nógv, so er einki av hesum úr gulli, men enn dugir Bárður als ikki at siga, um hann verður partur av enn eini roynd at vinna gullið, tá Oyggjaleikir verða í Álandi í summar.

- Tað veit eg ikki. Eg veit sjálvandi, at fyrireikingarnar eru byrjaðar, men eg dugi slettis ikki at siga, um eg verði ein partur av hesum ella ikki, sigur Bárður Bendix Mikkelsen.

# Spennandi judofinalur

**Á felags finaludegnum hjá judo, borðtennis og badminton leygardagin verða seks spennandi judodystir í tveimum vektbólkum**

JUDO
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Í opnum bólki hjá monnum verður fyrra bronsufinalan millum Jógvan Páll Kristiansen úr Sunda Judofelag og Áka Davidsen úr Havnar Judofelag, meðan seinna verður millum Hjalmar Johannesen úr Sunda Judofelag og Jógvan Martin Davidsen úr Havnar Judofelag.

Sjálv finalan verður millum Petur Sigurð Johannesen úr Sunda Judofelag og Skarpheðin Njálsson úr Havnar Judofelag.

### Menn undir 73 kg.

Tveir av bronsufinalistunum í opna bólkinum hjá monnum, nevniliga teir báðir Hjalmar Johannesen og Jógvan Páll Kristiansen úr Sunda Judofelag, bresta eisini saman í sjálvari finaluni í vektbólkinum undir 73 kg.

Í hesum vektbólkinum verður onnur bronsufinalan millum Búgva Hansen úr Sunda Judofelag og Hendrik Johannesen úr Havnar Judofelag, meðan hin bronsufinalan verður millum Sigurd Bjørn Mørkøre úr Sunda Judofelag og Jógvan Martin Davidsen úr Havnar Judofelag.

Roknast kann við góðum og spennandi finaludystum millum judoíðkarar, har fleiri teirra óiva eisini fara at royna seg á Oyggjaleikunum á Álandi í summar.



*Hjá monnum undir 73 kg. møtast javnaldrarnir frá Norðskála Jógvan Páll Kristiansen og Hjalmar Johannesen*
*Sofus D. Johannesen*